# Nýtt ferðavinnutilboð í Vestmanna

**Heri Dahl, sum hevur havt ríðiskúla í Havn í nøkur ár og Heini á Heygum, sum hevur veiðirættindi á vøtnunum við Lómundaroyru oman fyri Vestmana, eru nú saman farnir at marknaðarføra tilboðið, sum teir rópa fisking og frítíð**

FERÐAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Fólk hava høvi at keypa sær ein part av hesum tilboði – ella allan pakkan. Tað er púrasta upp til tann ella tey, sum hava hug at royna hetta, sigur Heri Dahl*

- Sum nakað heilt nýtt kunnu vit nú bjóða sílaveiðu og yvirnátting á sama staði. Vælumtókta sílaveiðan á okkara vøtnum ger tað nú nógv lættari hjá vitjandi, ið ikki longur noyðast heim eftir lokna veiðu. Nú ber nevniliga til at gista í okkara stásiligu húsvognum, sum vit hava sett upp á hesum náttúruvakra øki.

Heri Dahl sigur, at umfram sílaveiði, gisting og gongutúrar, skipa teir eisini fyri túrum á rossabaki.

Fólk, sum kundu hugsað sær at roynt nýggja tilboðið hjá fiskogfritid, sum teir rópa tað, kunnu fara inn á heimasíðuna fiskogfritid@com.

- Á heimasíðuni fáa fólk ein “forsmakk” upp á tann einastandandi møguleika, sum hetta er, sigur Heri Dahl.

Hann vísir á, at nógv og góð síl eru at fáa á hesum vøtnum.

- Her eru tvey vøtn, har tað fremra vatnið er nógv størri enn tað niðara.

Heri sigur, at gistin fer fram í marglætisvognum, sum standa við Lómundaroyru, har útsýnið yvir niðøara vatnið er eitt rættiligt panorama.

- Fólk hava høvi at keypa sær ein part av hesum tilboði – ella allan pakkan. Tað er púrasta upp til tann ella tey, sum hava hug at royna hetta.

Heri Dahl sigur, at tilboðið eisini er sera væl egnað sum ein veruligur familjupakki.

- Í báðum kampingvognunum er pláss fyri tilsamans 14 fólkum, leggur hann aftrat.

## Stýring frá a til ø

### – verkætlanarleiðari til menningardeildina

**Menningardeildin í Føroya Banka hevur ábyrgd av at samskipa og stýra øllum verkætlanum bankans og arbeiðir eftir einum skipaðum leisti í tøttum samstarvi við virkisøkini og leiðsluna. Vit víðka nú hóp okkara av dugnaligum verkætlanarleiðarum, og kanska er tað júst tær, vit leita eftir.**

**Starvið**
Sum verkætlanarleiðari í bankanum fært tú ábyrgd av verkætlanum og uppgávum frá a til ø, eins og vit vænta eina handilsliga tilgongd og tætt samstarv í toyminum við denti á úrslit.

**Tú**
Tú hevur viðkomandi hægri útbúgving og royndir sum verkætlanarleiðari. Persónligu eginleikar tínir eru m.a. opinleiki, framsøkni, málsøkni, góð samskiftisevni og sjálvstøðugt arbeiðslag, eins og tú megnar at hava greiði á fleiri uppgávum í senn.

**Menningarmøguleikar**
Góðir møguleikar eru fyri víðari førleikamenning, bæði fakliga og persónliga.

**Meira at vita**
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Inga Vestergaard, menningarleiðara, á tel 330 330 ella á iv@foroya.fo.

Skrivlig umsókn saman við avritum av CV og prógvum skal sendast til starvsfolk@foroya.fo ella til P/F Føroya Banki, Att: Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 21. juli.**

SENDISTOVAN

FØROYABANKI